# Greinin, ið bleiv til eitt træ - annar og síðsti partur

DÁVID ISFELD
Hósvík



Eitt sindur um søgu. Eg havi stóra virðing og alsk fyri søguni, bæði heims- og Føroya søga, og tískil haldi eg søguavnoktan, søgu-manipulatión og søgufalsan vera sera álvarsamt og andstyggiligt. Vit mugu ongantíð gloyma, at bumban brast í Tinghúsinum í 1945, líka so lítið, sum vit mugu gloyma, at Føroya fólk atkvøddi fyri loysing í 1946; ikki so Virgar? Og danska stjórnin beindi Løgtingið til hús, sum óargaungar - so nógv virdu teir fólkaræðið í Føroyum. Harafturat skal nevnast, at amtmaðurin bað donsku stjórnina um at herseta Tinghúsið, og í hesum sambandi kom eitt danskt herskip til Føroya; til reiðar at loypa á og niðurberja eina møguliga føroyska mótstøðu. Heldur ikki eiga vit at gloyma - vit mugu jú ikki »fortrongja søguna«, Virgar - at føroyingar ongantíð hava latið Føroyar upp í danskar hendur. Føroyar vóru bara tiknar sum »herfongur« eftir Noreg.

**Faroe-Disney**
Virgar og Rolf tykjast ongan veruligan áhuga at hava í føroyskum politikki; teir vilja bert hava, at Føroyar ongantíð broytast. Føroyar skulu ongar ambitiónir hava, onga burðardygga vinnu (tað kann blokkurin klára), bert miðaldarliga veiði- og seyðamentan við øllum tí friði og hugna, sum har til hoyrir. Best var eisini, um einki Løgting var - eingin politikkur. Føroyar skulu vera eitt danskt amt og liggja óbroyttar í útnorði, sum eitt feriupláss hjá teimum og teirra. Eitt slag av Disneyland, ikki eitt samfelag, men eitt feriustað - eitt Faroe-Disney.

Til hetta skal sigast, at Føroyar, fyri okkum, sum búgva her, ikki bert er eitt sorgblítt minni ella eitt hugnaligt stað at ferðast til. Hetta er okkara heim; okkara uppruni, lív og framtíð. Hetta er okkara byrjan og endi, okkara alt. Vit, sum ynskja fullveldi, við tilhoyrandi avbjóðingum, fyrimunum, arbeiði og ábyrgd, hava ikki í sinni at oyðileggja nakað fyri nakran. Vit ynskja bert at byggja, menna og reka landi sjálv. Hví er hetta so trupult at skilja og góðtaka? Tað hevur altíð verið so millum menniskju, og so vil altíð vera.

**Eftirmeting**
Eg veit ikki hvussu nógv ein skal siga um slíkt kjak og slíkar menn. Eg skrivaði ikki til Virgar, fyri at gera meg inn á persónin, men helt máliskurnar og navnakallingina vera óneyðugt ljóta, og tað meini eg framvegis. Tað er at fara yvir um mark, tá ið fólk, sum í dag hoyra eina fullveldisrørslu til, verða kallað brotsmenn og vera javnsett við terroristar, vegna einkultar persónar, ið fyri 60-70 árum síðan møguliga gjørdu okkurt ivasamt - eingi prógv, eingin dómur og eingin sekur. Dømi um fordómar fáast ikki betur, enn tey frá Virgari og Rolfi. Ynskja vit ein illgitingarstorm og juridiskt kaos, so er bert at geva Virgari og Rolfi rætt í teirra postulatum.

Eftir sjálvrannsókn og eftirmeting av farnu skriving millum Virgar, Rolf, meg og onnur áhugaði, má eg ásanna, at hetta kjak hevur verið ov lítið sakligt og handla ov nógv um persónar. Tískil haldi eg eisini, at evnini í kjakinum hava vantað sakliga viðgerð, og hevur kjakið sostatt havt ov lítlan relevans samfelagsliga eins og fólksliga. Hetta hevur, eftir mínum tykki, tískil verið eitt ófruktabært kjak, sum hevur givið mær lítlan lærdóm og einki nøgdsemi. Vanliga dámar mær væl at kjakast, tí tað er avbjóðandi og læruríkt. Í hesum føri hevur tað ikki givið mær tann »geist« og nøgdsemi, sum eg vanliga kenni við skriving og kjaki.

Tað er trupult og drúgt at byggja eitt hús, men skjótt at ríva tað niður. Soleiðis er eisini við skriving; tað er drúgt og krevur nærlagni og hegni at skriva væl og konstruktivt, og er hetta sera gevandi, tá ið tað eydnast væl. Hetta kjak hevur roynst heldur illa, og fari eg tí at gevast við hesum, og heldur halda á fram við onkrum øðrum evni. Eg eri samdur við Virgari og Rolfi um týdningin av at kenna, virða og minnast søguna; eins og eg við tokka ásanni tolsemi og virði trúar- og talufrælsið. Eg fari ikki at luttaka í slíkum kjaki aftur, sum snýr seg meira um at vera grovur í kantinum, enn tað snýr seg um virðiliga og sakliga viðgerð av einum evni, sum kann geva okkum, ið kjakast, og teimum, sum lesa kjakið, víðari sjónarring og størri innlit í og fatan av evninum

**Síðstu orðini í hesum kjaki**
Talufrælsið er eitt høvi til alment at siga nakað við okkara leiðarar, javnlíkar og medmenniskju, sum er ein serrættur, ið ein lítil brotpartur av okkum menniskjum upp gjøgnum øldirnar hevur havt høvið at notið gott av. Tit báðir hava verið skúlalærarar. Tit hava einaferð verið til at hjálpt børnum og ungum til kunnleika og førleika. Tað er eingin orsøk at gevast við tí, nú tit í tykkara otium hava tíð til at hugsa í friði.

Eg havi deils verið vónbrotin og argur av hesum kjaki, men eg fái altíð vónina og árræðið aftur. Eg havi ikki hug til at enda hetta kjak við ljótum ella deilandi orðum, tí tað er ikki í mínari náttúru. Hesi verða míni síðstu orð í hesum kjaki:

Walt Whitman segði:

»(…) the powerful play goes on, and you will contribute a verse.«

»The powerful play« er lívið á jørð, meðan »versið« er títt lív; títt ískoyti til »máttmikla leikin«. Hvat verður okkara vers, okkara ískoyti til heimin; til okkara samfelag og okkara kæru? Hvat vers liggur eftir okkum til samtíð og eftirtíð? Mítt vers, vóni eg, setur gongd í ein jaligan tanka, hjálpur eitt sinn í iva, kveikir eina góða gerð og vinnur okkurt hjarta. Hóast vit eru ill, ónøgd og ósamd til tíðir, kunnu vit siga okkara hugsan á ein virðiligan hátt. Einki hjarta verður vunnið við ókrúti. Einki sinn verður syft við harðskapi ella hørðum orðum. Vit kunnu upplýsa og hugvekja onnur, men ikki noyða tey. Ein maður kann leiða hestin til ánna, men tjúgu manns kunnu ikki noyða hestin at drekka. Uttan etik og estetik eru vit bert intelligent beist.

Farið væl við tykkara medmenniskjum, Virgar og Rolf, og havið tað gott.

# Pensiónin hjá politikaranum og hjá vanliga fólkinum

MARTIN PAULI JACOBSEN

**- Bruttoløn til poltikararnar, so vit fáa gjøgnumskygni**

Nú arbeiða politikararnir við nýggjari pensiónsskipan til vanlig fólk.

Er samsvar í millum, hvat politikarar betala sær sjálvum í pensión, og tað, vanlig fólk betala í pensión?

Hvat er virði av pensiónini hjá politikarum?

Eg vil samanlíkna pensiónina hjá vanligum fólkum, tingfólkum, landsstýrisfólkum og tænastumonnum.

Procentvirðið av pensiónini hjá hesum bólkum er:

| | |
|---|---|
| Vanlig fólk | 15% |
| Tingfólk | 4,5% |
| Landstýris fólk | 9% |
| Tænastumenn | 2,5% |

Í okkara roknistykki seta vit realrentuna til 0.

**Vanlig Fólk**
Tað er ógvuliga vanligt at fólk betala 15% í pensión. Hesi procent verða býtt á fylgjandi hátt:

Trygging við deyða, óarbeiðsføri og har umframt administratión: 5%

Pensión: 10%

Hetta merkir at 10% av tryggingini verður nýtt til pensión, ið verður útgoldin tá persónurin er 67 ára gamal.

Um ein sigur, at hesin vanligi persónurin skal kunna liva sum pensionistur við 60% av síni løn, sær roknistykkið soleiðis út.

Antal arbeiðsár at fíggja eitt ár sum pensionistur: (100/10) x 0,6 = 6 ár

Persónurin skal sostatt arbeiða í 6 ár fyri at finansiera seg sjálvan eitt ár sum pensionistur við 60% í pensión.

Í dag kann ein fara frá við pensión sum 67 ára gamal. Um vit seta miðal livialdurin til 82 ár, so eru tað 15 ár sum ein skal spara pensión upp til.

Hetta merkir, at ein skal betala inn til sína pensión í 90 ár. (6 x 15 ár)

Ein miðal persónur í dag er á arbeiðsmarknaðinum í umleið 40 ár. (27-67 ár)

Her sæst, at 10% í pensión er ov lítið, av tí at vit liva í miðal 15 ár sum pensionistar.

Út frá hesum má pensiónin tí hækkast til 22,5%. (90/40) x10)

Leggja vit so tey 5% aftrat, ið verða brúkt til deyða, óarbeiðsføri og umsiting, so skulu vanlig fólk betala 22,5 +5 =27,5% í pensión.

**Eitt vanligt fólk skal betala 27,5% í pensión fyri at finansiera 15 ár sum pensionistur við einum útgjaldi, ið er 60% av mánaðarlønini.**

**Politikarar og tænastumenn**
Pensiónin til politikarar skal roknast út á ein heilt annan hátt. Politikarin fær nevnliga síni procentir hvørt ár hann er pensionistur.

Fylgjandi procent satsir eru galdani:

Løgtingslimur: 4,5% um árið.
Landsstýrisfólk: 9 % um árið.
Tænastumaður: 2,5% um árið.

Í tí fylgjandi vilja vit rokna út, hvussu nógv virði liggur í pensiónini, sum politikararnir vinna.

Dømir:
Politikarin/tænastumaðurin verður pensioneraður, tá hann er 67 ára gamal. Eisini hann fær í miðal útbetalt pensión í 15 ár. Men hendan útrokningin verður tó ørvísi, enn útrokningin hjá tí vanliga fólkinum, av tí at vunnin % í pensión verða útbetalt hvørt ár í 15 ár.

Virðið av pensiónini hjá løgtingslimi verður sostatt: 15 x 4,5% = 67,5%

Virðið av pensiónini hjá landstýrsfólki verður sostatt: 15 x 9% = 135%

Virðið av pensiónini hjá tænastumanni verður sostatt: 15 x 2,5% = 37,5%

Í krónum er virði av pensiónini:
Løgtingslimur fær 34.000 kr/mðr.: 34.000 x (67,5 +5)/100 = 24.650 kr/mánaðin í pensión.

Landstýrismaður fær 53.000 kr/mðr.: 53.000 x (135+5)/100 = 74.200 kr/mánaðin í pensión.

Tænastumaður siga vit fær 50.000 kr/mðr.: 50.000 x (37,5+5)/100 = 21.250 kr/mánaðin í pensión.

5% verða roknað sum trygging við deyða, ólukku og administratión.

Tann veruliga bruttulønin tvs. nettoløn + pensión hjá løgtingslimum, landsstýrislimum og tænastufólkum, sær soleiðis út:

Løgtingslimur: 34.000 + 24.650 = 58.650 kr/mánaðin

Landstýris limur: 53.000 + 74.200 = 127.200 kr/mánaðin

Tænastumaður: 50.000 + 21.250 = 71.250 kr/mánaðin

Niðurstøða:
Vanlig fólk betala alt ov lítið til teirra pensión, samanlíknað við politikarar/tænastumenn.

Verandi pensiónsskipan hjá politikaraum og tænastumonnum goymir tann veruliga lønarkostnaðin.

**Gevið tí politikarum/tænastumonnum eina brutto løn. Hetta vil geva gjøgnumskygni. Vónandi tekur onkur politikari hetta hugskot til sín.**

# Ikki lata tónleikin verða offur fyri loysing ella samband!

FRÍÐÁLVUR JENSEN



**- tað haldi eg tónleikurin hevur allar minst brúk fyri!**

Nú hevur í ára tíggir verið tosað um enn fleiri pengar og virðing fyri tónleikinum og mentanini, men nú tykist kjakið at venda sær til politisku skipanina við ynski um, at alt hetta nú skal snúgva seg um loysing ella samband – tað harmar meg, ómetaliga!

Eg haldi, at tað er nógv fyri, at vit skulu verða vitni til slíkt, tí tað kann bara skaða kjakið her heima og uttanlanda – hetta snýr seg sanniliga um alt annað enn tað.

Hvør mín politiska støða er, er líka mikið í hesum, tí hetta er sanniliga ein spurningur, um vit síggja møguleikarnar í teimum fantastisku fólkunum, sum, ferð eftir ferð, vísa seg á tónleika- og mentanarliga pallinum.

Latið nú vera við slíkum – JÁTTIÐ TÓNLEIKINUM OG MENTANINI, SUM SKAL TIL – so hesi føla, at tað liggur ein pengaligur og virðiligur stuðul aftanfyri teirra avrik!

So kunnu vit kjakast higani og hvaðar tað skal verða, um vit skulu loysa okkum úr ríkisfelagsskapinum – tað skal bara ikki ganga út yvir tónleikin og mentanina!

Takið tykkum saman og síggi teir fantastisku møguleikarnar, sum eru okkara evnum skapandi fólki!

Eg sigi tað einaferð enn – geva tit tónleikinum og mentanini tað sum skal til, eri eg vísur í, at vit ØLL fara at heysta nógv gott – bæði innan tað privata og vinnuna.

Er tað eitt krav, at vit skulu loysa frá Danmark, fyri at kunna taka sjálvstøðugan lut í Eurovision, er tað ein longri tilgongd, men lat nú ikki alt fara at snúgva seg um loysing ella samband – tað hevur tónleikurin so ikki brúk fyri!

Áðrenn vit koma hagar, tá vit skulu taka støðu til okkara ríkisrættarligu viðurskifti, er umráðandi at fáa staðfest, um vit hava møguleika fyri sjálvstøðugari luttøku – tað má verða gongda leiðin, sum støðan er.

Lat okkum síggja møguleikarnar heldur enn forðingarnar, so vit kunnu gera tónleikin til eina inntøkukeldu til samfelagið í hesum tíðum – eins og, til dømis, svenskara hava gjørt.